## Eydnaðist væl

Fyrsti dagurin á fótbóltsskúlanum hjá Liverpool varð avgreiddur á ovari vølli í Gundadali í gjár. Og tað eydnaðist væl. Ungdómarnir hugnaðu sær allan dagin, har John Aldridge, Alan Kennedy og Michael Thomsen vóru millum venjararnar, sum løgdu teimum lag á. Veðrið var av tí besta, hóast tað einu løtuna regnaði. Hetta er eitt frálíkt høvdi hjá føroyska ungdóminum at vísa síni evni, um dreymurin at gerast yrkisleikari skal gerast veruleiki.



## Ein minniríkur dagur

Fótbóltsfelagið Frem hevur seinastu vikurnar stríðst fyri at fáa felagið frá at fara á húsagang. Tað eydnaðist í gjár, og liðskiparin Tim Ilsø var ovurfegin. – Hetta er ein stórur og minniríkur dagur fyri felagið. Teir seinastu mánaðirnar hava verið eitt satt helviti. Men nú eru vit ávegis móti nýggjum tíðum. Nú standa vit saman, sigur Til Ilsø við heimasíðuna bold. dk

# Føroyar liggja til at vinna



### FØROYSK HEIÐURSMERKI

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Island of Man 1985 | 0 | 2 | 1 |
| Guernsey 1987 | 1 | 2 | 5 |
| Føroyar 1989 | 13 | 5 | 10 |
| Áland 1991 | 6 | 10 | 11 |
| Isle of Wight 1993 | 5 | 5 | 13 |
| Gibraltar 1995 | 5 | 7 | 10 |
| Jersey 1997 | 5 | 10 | 22 |
| Gotland 1999 | 7 | 12 | 9 |
| Isle of Man 2001 | 15 | 12 | 13 |
| Guernsey 2003 | 6 | 10 | 12 |
| Hetland 2005 | 14 | 11 | 20 |
| Rhodos 2007 | 24 | 19 | 1 |
| Áland 2009 (higartil) | 23 | 14 | 21 |

*) Tølini eru dagførd við kappingunum mikudagin

**Føroyar seta nýtt heiðursmerkjamet á Oyggjaleikunum hesaferð, og møguleiki er fyri, at Føroyar kunnu enda ovast í samlaða heiðursmerkjabýtinum fyri fyrstu ferð nakrantíð**



eydun@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein

Føroysku ítróttarfólkini standa til at gera sítt besta heiðursmerkjahál á Oyggjaleikum nakrantíð.

Tá ið kappingarnar vóru lidnar mikukvøldið, høvdu Føroyar vunnið 23 gullheiðursmerki, og tað er bert eitt færri enn higartil besta úrslitið, sum var á Rhodos fyri tveimum árum síðani.

Framvegis eru tríggir kappingardagar eftir, og tað er rættiliga vist, at Føroyar vinna onkur gullmerki afturat.

Tá ið tað kemur til øll sløg av heiðursmerkjum hava Føroyar vunnu fleiri heiðursmerki hesaferð, enn nakrantíð áður

- Leikirnir verða róptir "Vinarligu leikirnir", og tað eru teir alla staðni uttan á leikvøllinum. Har eru tað ítróttafólk, sum kappast fyri at vinna. So sjálvt um leikirnir hava nógv at siga mentunarliga og fyri sambandið millum oyggjar, er eingin ivi í, at tá tað kemur til sjálva kappingina, snýr tað seg um at vinna. Og hetta er júst ítróttur - at vit virða tær avtalaðu spælireglurnar og gera okkara besta á leikvøllinum, so vit kunnu vera vinir uttanfyri, sigur Sølvi Reinert Hansen, ítróttarforseti.

### Trupult at vinna heilt fram

Føroyar vunnu fyrsta gullmerkið á Guernsey í 1987, og tá ið leikirnir vóru hildnir í Føroyum árið eftir komu Føroyar eisini við í bólkin var vertslondum, sum klára seg væl. Seinastu tveir Oyggjaleikirnar hava Føroya staðið seg enn betur, og á Rhodos seinast vunnu Føroyar fleiri gullmerki enn nakrantíð áður.

Men nú hava føroysku ítróttarfólkini gjørt enn eitt hál á Oyggjaleikum, og roknað verður við, at dagurin í dag verður dagurin, tá ið nýtt gullmet verður sett á Oyggjaleikum.

- Øll, sum fáast við ítrótt á høgum støði, droyma um at vinna heiðursmerki. So persónliga hava heiðursmerkini nógv at siga. Hjá ítróttagreinunum hava tey eisini nógv at siga, eftirsum tey bera boð um, á hvørjum støði ítróttafólkini eru í mun til hinar oyggjarnar, sigur Sølvi Reinert Hansen.

- Annars verður vanliga ikki gjørt so nógv burturúr samlaðu heiðursmerkjakappingini, eftirsum kappingargreinarnar eru so nógvar, og støðið broytist millum leikirnar, sigur hann.

### FAKTA

**Heiðursmerkjabýti á Oyggjaleikum**

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| Føroyar | 23 | 14 | 21 |
| Isle of Man | 19 | 19 | 12 |
| Jersey | 15 | 23 | 9 |
| Guernsey | 13 | 8 | 15 |
| Gotland | 10 | 6 | 11 |
| Áland | 8 | 11 | 9 |
| Bermuda | 5 | 4 | 9 |
| Saaremaa | 4 | 4 | 8 |
| Caymanoyggjarnar | 4 | 3 | 1 |
| Rhodos | 3 | 6 | 3 |

*) Tølini eru dagførd við kappingunum mikudagin

**Annika Vang og Jógvan Niclasen eru tvey av ítróttarfólkunum, sum aftur hesa ferð hava gjørt góð hál. Tilsamans høvdu tey bæði vunnið 5 gullmerki, tá støðan varð gjørd upp mikukvøldið**

Mynd: Álvur Haraldsen